### Reiðarin hjá P/F Vesturvón:

# JFK skuldi verið boðið út alment





*- Flakatrolarin, Vesturvón og flakatrolararnir hjá JFK, Skálaberg og Sundaberg, hava somu veiðimøguleikar – og henda vinna er góð "forrætning" í løtuni, sigur reiðarin hjá P/F Vesturvón, Ólavur Petersen*

**Í vikuni hevur ljóðað, at P/F Vesturvón, sum eitt nú eigur flakatrolaran, Vesturvón, hevði bjóðað Føroyagrunninum meira fyri partabrøvini í JFK-samtakinum enn Hanus Hansen, stjóri og Norðoya Sparikassi, men hetta avsannar reiðarin, Ólavur Petersen**

JFK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Nei, vit hava ikki bjóðað upp á partabrøvini í JFK-samtakinum, tí vit vistu snøgt sagt einki um avtaluna. Tað hevur ikki verið í okkara huga, at Føroyagrunnurin fór at selja partabrøv í JFK, og tí hava vit heldur ikki gjørt okkum nakrar tankar um, hvørt vit kundu hugsað okkum at bjóðað.

Hetta sigur reiðarin hjá P/F Vesturvón, Ólavur Petersen, sum soleiðis avsannar søguna um, at felagið hevur bjóðað meira fyri partabrøvini enn Hanus Hansen, stjóri og Norðoya Sparikassi.

### Undraðust

- Jú, vit undraðust, tá ið vit frættu um avtaluna, sum Føroyagrunnurin øðrumegin og Hanus Hansen og Norðoya Sparikassi hinumegin hava gjørt.

Ólavur Petersen heldur avgjørt, at partabrøvini skuldu verið útboðin alment, tá ið talan er um ein almennan grunn, sum Føroyagrunnurin í hesum førinum er.

Spurdur, um P/F Vesturvón hevði havt áhuga í partabrøvunum, um felagið fekk høvið at bjóða, sigur reiðarin, at tað dugir hann ikki at meta um, tí felagið hevur ikki innlit í viðurskiftini hjá JFK.

- Nú Føroya Fiskavirking og onnur feløg, sum tað almenna eigur, skulu bjóðast út, áðrenn einskiljing fer fram, høvdu vit eisini væntað, at ein almennur grunnur sum Føroyagrunnurin fór at bjóða út síni partabrøv við møguligari sølu, sigur Ólavur.

### Gongur væl

P/F Vesturvón er í somu vinnu við flakatrolaranum, Vesturvón, sum JFK er við Skálabergi og Sundabergi, og skipini hava somu veiðirættindi. Tí spurdu vit Ólav, hvussu henda vinna er fyri í løtuni.

- Jú, flakavinnan gongur væl, og prísirnir á flaki eru góðir.

Hann vísir á, at tað er góð "forrætning" at hava flakatrolarar, soleiðis sum gongdin er í løtuni.

- Vit kundu hugsað okkum, at kvoturnar eystanfyri vóru eitt sindur størri, og soleiðis vil tað nú einaferð vera, men hendan vinna er í einum góðum tíðarskeiði sum er, sigur Ólavur Petersen, reiðari.

Flakatrolarin, Vesturón, er nýliga farin til Grønlands at royna eftir svartkalva og at royndarfiska eftir toski. Teir hava eini 50 tons av toski eftir eystanfyri og nakað av flatfiski, sum teir fara eftir seinni í heyst, tá ið túrurin í Grønlandi er liðugur, helst um einar tríggjar mánaðir ella so.

## Landsstýrið harmast

JFK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Landsstýrið hevur viðgjørt málið um søluna av partabrøvunum í JFK-samtakinum og sigur seg "harmast um mannagongdirnar í sambandi við søluna".

-Gjøgnumskygni vantaði, og einki alment útboð hevur verið, sum gevur øllum javnbjóðis møguleika at keypa.

Landsstýrið sigur, at gjøgnumskygni og alment útboð kundi tryggjað, at rættur prísur fekst fyri partabrøvini.

- Landsstýrið er samt um, at tað nú liggur á Fíggjarmálaráðnum at tryggja, at formligu viðurskiftini við fondsmyndugleikan eru í lagi.

Í stuttum verður sagt, at nú almenn partafeløg verða einskild, leggur landsstýrið dent á, at leiðreglurnar fyri einskiljingar, sum eitt nú fevna um gjøgnumskygni og opinleika, verða fylgdar.

### Karsten Hansen, fyrrverandi fíggjarmálaráðharri:

# Anfinn Kallsberg setti ófrávíkiligt krav um leiðreglur

**- Tað er týdningarmikið at seta sær spurningin, um landsstýrið framhaldandi ætlar sær at hava hesar grunnarnar, sum eru suverenir – ella um vit skulu hava eina aðra skipan, heldur Karsten Hansen, løgtingsmaður og fyrrverandi fíggjarmálaráðharri**

JFK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, sum er valdur løgtingsmaður í Norðoyggjum, heldur ikki, at sølan av partabrøvunum í JFK-samtakinum er farin fram sambært teimum leiðreglum, sum landsstýrið undan hesum setti sær fyri.

- Tað var Anfinn Kallsberg sum løgmaður, ið setti ófrávíkiligt krav um leiðreglur í undanfarnu samgongu. Nú skuldi skil fáast á hesi viðurskifti við gjøgnumskygni og almennum útboði av ognum, sum tað almenna eigur ella varðar av.

Karsten Hansen sigur seg tí undrast yvir úttalilsini hjá Anfinni, nú hann heldur tað vera í lagi, at Føroya-



*- Fyri lokalsamfelagið í Norðoyggjum er hetta ivaleyst ein góð loysn. Endamálið við Føroyagrunninum er at skapa virksemi í økinum, men sum løgtingsmaður og fyrrverandi fíggjarmálaráðharri er eingin ivi um, at avtalan millum partarnar er ikki í samsvari við leiðreglurnar, sigur Karsten Hansen*